**Foreldur:**
Fríðrikkur 9. og Ingrid drotning

**Fødd:**
16. apríl 1940 á Amalienborg

**Dópur:**
14. mai 1940 í Holmens Kirke

**Ferming:**
1. apríl 1955 á Fredensborg Slot

**Navn:** Margrethe Alexandrine Torhildur Ingrid

**Vígd:**
10. juni 1967

**Børn:**
Fríðrikkur André Henrik Christian, føddur 26. mai 1968, og Joachim Holger Waldemar Christian, føddur 7. juni 1969


MYND: POLFOTO


MYND: POLFOTO


MYND: POLFOTO


*Zacharias Zachariassen, borgarstjóri í Fugloy, handar teimum kongaligu ein málning í 2005*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

# »DANISH CROW VITJAR Á STÓRU

Á SUMMARFERÐ SÍNI TIL FØROYAR VITJAR MARGRETA DROTNING ÚTI Í STÓRU DÍMUN, HAR TEY TURKA DANSKAR SKINKUR FRÁ DANISH CROWN Á SAMA HÁTT SUM SKERPIKJØT. MEN KONSERT VIÐ SIR ELTON JOHN STENDUR IKKI Á SKRÁNNI

**DROTNINGAVITJAN**

**Rigmor Dam**
rigmor@sosialurin.fo

Fornfrøði í Koltri. Tíðindafundur í Dímum. Bringubreiðir politikarar, sum lata seg heiðra av danska kongshúsinum.

Ja, upplivingarnar verða mangar, men siðbundnar, tá Margretha drotning og Heindrikkur prinsur vitja í Føroyum um summar.

Sostatt eru ongi útlit fyri, at føroyingar sleppa at bjóða hennara hátign til royala konsert á Tórsvølli hjá Sir Elton John, ið man vera tónleikavitjan kongum verdug.

Men úti í Tinganesi hava tey leingi havt úr at gera við at fyrireika drotningavitjanina, sum verður í døgunum 26. juni – 1. juli.

Petur Petersen, serligur ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, sigur við Sosialin, at skráin er um at koma undir land, men enn eru nakrir snøklar eftir.

## Kemur víða um

Umframt, at drotningin fer at brúka kongsskipið Dannebrog sum pall, tá hon fer at heingja heiðursmerki á bringurnar á toppunum í føroyska samfelagnum, kemur hon víða um í næstan øllum landinum. Úr Norðoyggjum og suður til Stóru Dímun. Farið verður eisini vestur um til Mykinesar og Vágar, til Norðstreym, í Eysturoynna, út í Koltur og til Havnar. Eisini er ætlanin at sigla eitt sindur runt millum oyggjarnar, eitt nú suður um Hestoynna. Har skipið leggur at, verður vitjað á stovnum, hjá kommunum og í fyritøkum.

Roknað verður við, at hennara hátign leggur leiðina framvið nýggja skúlan við Løkir í runavík. Eisini fer hon helst at vitja skúlan við Løgmannabrey og Fiskivinnuskúlan í Vestmanna.

## Skinka og fornfrøði

Millum meiri forkunnugu vitjanirnar nevnir Petur Petersen Koltur, har tey í løtuni seta gamla býlingin í